# Ítróttarblaðið

### Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## Popczynski togast um uppflyting

Krzyzstof Popczynski, sum áður hevur havt evstu ábyrgdina av VB, GÍ, HB og TB, er nær við at flyta upp í næstbestu donsku deildina við Aarhus Fremad. Átta dystir resta í, og Popczynski og hansara spælarar eru nummar trý við 48 stigum. Ovastu liðini, Blokhus FC, 50 stig, og Thisted, 49 stig, hava spælt ein dyst meira enn Aarhus Fremad. Tvey lið hava møguleikan at flyta upp. Popczynski fekk bara eitt stig á útivølli móti Skovbakken, sum er nummar fýra við 38 stigum, um vikuskiftið. Úrslitið var 3-3. Aarhus Fremad var á odda 2-0 og 3-2, men tað rakk ikki til ein sigur.

# Føroyskur hundur bestur í Danmark

### Í gjár varð skipað fyri agility- og lopkapping fyri hundar í Give. Føroysku hundurin, Simba, vann heiðurin sum dagsins besti stóri hundur í kappingini, sum var í Give

Føroya Civila Hundaførarafelag (FCH) hevði avgjørt at senda FM vinnaran fyri 2010 til Danmarkar, og hetta vísti seg eydnast sera væl.

Tað var Jakobina Niclasen og hundurin Simba, ið luttóku. Tað eyndaðust teimum at koma á eitt fjórðapláss bæði í agility- og lopkappingumum í klassa 1. Í tí opna klassanum fyri sera væl vandar hundar, blivu tey nr. 9 í agility og nr. 8 í lop.

Við hesum úrslitum vann Simba eisini heiðurin sum dagsins besti stóri hundur í Give.

Forkvinnan í FCH Fríðhild Debes, ið eisini var til staðar í Give, sigur seg vera sera nøgda við úrslitið. Hon vónar eisini, at FCH fær møguleikan at senda FM vinnaran fyri 2011 til Danmarkar at kappast til komandi ár.

Agility er ein ítrottur fyri hundar, har tað ræður um, at tú rennur við hundinum gjøgnum fleiri ymsikar forðingar. Dømt verður eftir, hvør hundur klárar at renna skjótast og við minst mistøkum.

FCH skipar árliga fyri fleiri FM kappingum í agility, har tað so verður ein finala við leynavatn í august.



# AC Milan er eitt stig frá Scudetto

### Ikki síðani 2004 hevur AC Milan vunnið italsku landskappingina, men nú teir bara eitt stig frá at koppa grannunum úr Inter av toppinum

**Tróndur Arge**

Síðani Calciopoli skandaluna í 2006, sum rakti flestu toppliðini í Italia, hevur Inter Milan siti á fremsta plássinum í Seriu A. Men í ár sær út til, at tað verða grannarnir úr AC Milan, ið fara at vinna fyrsta italska meistaraheitið síðani 2004

AC Milan hevði í vikuskiftinum vitjan av Bologna. Tað bleiv til ein tepran 1-0 sigur til teir reyðu og svørtu. Tað var fyrrverandi Arsenal miðvallarin, Mathieu Flamini, ið skoraði einsamalla málið í dystin longur eftir átta minuttir.

Inter Milan gjørdi sína skyldu á útivølli móti Cesena, har fyrrverandi Sampdoria framherjin, Giampaolo Pazzini, skoraði tvey mál í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat. Eisini Napoli, sum liggur á triðja pássi, greiddi sína skyldu og vann 1-0 á Genoa við mál frá Marek Hamsik.

AC Milan er átta stig frammanfyri Inter Milan, sum liggur nummar tvey, nú trý umfør eru eftir í Seriu A.

*trondur@sosialurin.fo*

---

KÍ fekk í dystinum móti NSÍ á fyrsta sinni at merkja, at man nú spælir í Vodafonedeildini. Skilt á tann hátt, at gert tú mistøk, so verður tú revsaður.

*(nordlysid.fo)*

Hóast vit næstan allan dystin runnu aftaná, skuldi ein klokkuklárur dómarafeilur seta gongd á og so hugdu ÍF-ara ongantíð afturum seg aftur.

*(www.hb.fo)*

Hóast vit fegin vilja vera favorittar, tá vit spæla á heimavølli, so var tað EB/Streymur, sum var í hesum leiklutinum í dag. Mest sum einmælt hava fjølmiðlar og fjepparar skrálað samanlagda liðið til FM-favorittar, og tað eru teir helst eisini framvegis.

*(www.b36.fo)*

Víkingum ikki ólíkt, var spæl teirra, ið teir hava sitandi í genunum frá GÍ, til tíðir rættiliga hart. Tað endaði eisini við, at Atli Gregersen fekk beinleiðis reytt fyri at sláa frá sær.

*(www.07vestur.fo)*

Hóskvøldið var leikarafundur í felagshúsinum, har støðan viðvíkjandi uppmøting til venjing og innsatsi hjá leikarunum var viðgjørd. Byrjanin uppá kappingina hevur ikki verið tann besta, og tað var tí neyðugt at stramma upp. "Er glasið hálvfult ella er tað hálvtómt ?" ljóðar tann kendi filosofiski spurningurin, og ein av niðurstøðunum á fundinum var, at í FC Hoyvík er einki í glasinum, tí eingin tímur at fylla í. Menn vóru samdir um, at tað eru ov fáir leikarar sum taka ábyrgd yvir fyri sær sjálvum og hvørjum øðrum og at ov nógvir goyma seg. Um tað var fundurin sum gjørdi útslagið skal her vera ósagt, men sunnudagin fekk FC Hoyvík sín fyrsta sigur í hesum kappingarárinum, og hann var hart tiltrongdur.

*(www.fchoyvik.fo)*